## Fiskurin verður dýrari

Tann høgi oljuprísurin ávirkar nú fiskaprísin í Danmark, og tað ger, at tað verður dýrari at fara í handilin at keypa sær fisk til døgurða. Formaðurin í danska fiskimannafelagnum, Flemming Kristensen, sigur við DR, at í handlinum fer prísurin á fiski minst 10 prosent upp. Hann heldur, at almennur stuðul ella minni avgjald er tað einasta, sum kann tálma prísinum, men danskir fiskimenn fara tó neyvan í verkfall fyri at fáa stuðul, sigur hann.

*Danska húsmóðurin skal rinda minst 10 prosent meiri fyri fiskin*
*Mynd: DR*



## Kunna seg í Íslandi

Sunnudagin kemur ein grønlendsk sendinevnd til Íslands at kanna, hvussu íslendingar hava skipað stórídnaðin og serstakliga tey ovurstóru aluminiumsvirkini. Sendinevndin skal vitja á Eysturlandinum, og sunnudagin skulu umboðini vitja aluminiumsvirkið á Reyðarfirði. Alcoa, sum skal byggja aluminiumsvirki í Grønlandi, sigur hetta virkið. Dagin eftir vitjar nevndin eitt annað virkið, og týsdagin fer at hon at tosa við kommunupolitikarar.



*Nú er hetta tónleikasøga. Sputnik í nú farnum døgum, men leygarkvøldið verða gonlu tónarnir aftur at hoyra*

# Pallvandir brøður á pall í Trongisvági

**Tvíburðarnir Árni og Marnar Andreasen og brøðurnir Jens og Marner Lisberg eru kendir frá tónleikapallinum síðstu 30 árini og leygarkvøldið eru teir á palli í Trongisvági**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað er róðrarfelagið á Tvøroyri, sum hevur fingið hesar garparnar á pall saman leygarkvøldið í Trongisvági. Teir hava roynt hetta áður, og tað riggaði stak væl, so talan er í roynd og veru um eitt væleydnað og afturvendandi tiltak.

Jens og Marner Lisberg av Tvøroyri stóðu í mong ár á odda í bólkinum Sputnik. Bólkurin hevði ymsa manning ymsastaðni úr Suðuroynni, og millum limirnar ymsu tíðarskeiðini taldust so navnframir menn sum Johan Dahl og Rasmus Magnussen.

Sputnik spældi frá áleið 1975 og heilt til áttati árini tóku at halla. Bólkurin var óføra væl umtóktur, kanska serliga millum dansandi fólkið. Eftir 1988-89 var tað mest Jens Lisberg, ið helt á undir egnum navni, men tó hava hann og Marner av og á spælt saman. Og tá tað í veruleikanum eru teir, ið eru kjarnin í Sputnik, so ber á ein hátt til at siga, at bólkurin hevur verið virkin av og á. Bæði Sputnik og Jens hava lagt vælumtóktar útgávur eftir seg.

Árni og Marnar úr Havn vóru frá ungum árum í sjeytiárunum stovnarar og virknir í bólkinum Black Birds. Ein bólkur, ið spældi í mong ár, og sum ikki slakði, fyrr enn 90'ini høvdu sæð dagsins ljós. Eftir hetta fóru teir aftur at spæla undir gamla heitinum Julianneboys og síðani sum Árni og Marnar. Seinnu árini hava teir givið vælumtóktar útgávur út.

Black Birds var annars millum virknastu og best umtóktu bólkarnar í áttatiárunum, og gav eisini onkra útgávu út. Bólkurin hevði Oskar Eiriksson á trummum og nokkso støðugir limir vóru eisini Ronnie Nielsen og beiggi tvíburðarnar, Jóan Petur Andreasen, men aðiri taldust eisini í vælleikandi bólkinum, ið hevði breiða sangskrá, alt frá tí, ið var frammi í sjeyti- og áttatiárunum, til meira vanligan dansitónleik.

Leygarkvøldið verða tað m.a. Kolbein Simonsen, Arnbjørn Sivertsen og Kaj Johannesen, ið fara á pallin sum tónleikarar, tá pallvandu brøðurnir úr Havn og av Tvøroyri fara á pall í Trongisvági til eitt rimmar dansikvøld.

# Davidenættin hittist í Kvívík

ÆTTARSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygardagin 14. juni hittist Davidsen-ættin í Glæmuni í Kvívík. Høvið til hesa ættarstevnu er, at Bertie Davidson úr Kanada vitjar saman við konu síni.

Bertie er abbasonur Johan Hendrik Davidsen, sum flutti til Kanada í 1903. Johan Hendrik var sonur Aggusteinus og Biritu Davidsen í Kvívík, og eru tað teirra eftirkomarar, ið hava tikið stig til samkomuna.

Johan Hendrik, sum í Kanada varð kallaður Harry, var føddur 17. desember í 1879. Sum ungur fór hann til sjós. Hann var við enskum trolara, til hann flutti til Kanada í 1903. Næstu fýra árini arbeiddi hann sum arbeiðsmaður í fiskivinnu og landbúnaði í Siglunes-økinum, til hann giftist við Wilhjelminu 7. mars í 1908. Navnið Siglunes man vera frá íslendskum niðursetufólki.

Wilhjelmina var eisini føroysk, fødd á Válinum 7. februar í 1884, dóttir Peter Frederik Johannesen og Angeliku, f. Reinert. Hon flutti eisini til Kanada í 1903 saman við systrunum Súsonnu og Tomminu og einum beiggja, Ragnvald.

- Vit vóna sjálvandi at síggja so nógv skyldfólk sum gjørligt hendan dagin, sigur Marjun í Gong, fyrireikari. Johan Hendrik var langommubeiggi Marjuna.

Dóttir Marjuna, Lindis, hevur havt teldusamskifti við Bertie Davidson, og eitt systkinabarn hansara, Linden Davidson. Nógv er at síggja um ættina á heimasíðuni: www.faroeiceland.ca

Aggusteinus og Birita Davidsen fingu 11 børn. Tey vóru:

Rakul Davidsen
Anna Davidsen
Dávur Davidsen
Julianna Davidsen
Hanus Davidsen
Kristianna Davidsen
Johannes Davidsen
Joen Hendrik Davidsen
Mikkjal Pauli Davidsen
Sunnuvá Davidsen
Magnus Davidsen



*Johan Hendrik Davdisen í 1960*

# Naddoddur fingið gávu frá Sjóvinnudeplinum

**Bátafelagið Naddoddur á Tvøroyri fekk hóskvøldið handað gávukekk á 10.000 krónur frá Sjóvinnudeplinum. Hetta er tøkk fyri góðu umstøðurnar og tænastuna, ið Sjóvinnudepilin hevur nýtt í samband við trygdarskeið**

GÁVA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sjóvinnudepilin hevur havt manningarnar á skipunum hjá Strandferðsluni til trygdarskeið á Tvøroyri. Sum útgangstøði verður roynt at hava skeiðini umborð ella nærhendis skipunum, og ikki t.d. í skúlastovum. Skeiðini hava verið á Tvøroyri og øll útgerð var umborð á Smyrli. Men nógv praktiskt er víkjandi slíkum skeiðum, nógv útgerð, og síðani var farið á sonevndu Hvítanesbrúnna á Tvøroyri.

Men so varð víst til Helga Enni og Bátafelagið Naddodd og neyst teirra. Har hevur Sjóvinnudepilin notið góðar umstøður. Kynt var í ovninum, og so komu skeiðsluttakarar til heit høli, heitt kaffi og góðar umstøður at skifta og spula og turka draktirnar. Nú var ikki longur talan um kaldar skeiðsluttakarar og vátar draktir at frakta aftur til Havnar.

7 skeið hava verið, og sum nakað eyka, so hava 40 fólk fingið fingið lut í tí, at tyrlan tvær ferðir hevur verið partur av skeiðunum.

Nú liðugt er við skeiðunum á hesum sinni, vildi Sjóvinnudepilin fegin vísa sína tøkk til Bátafelagið Naddodd, sigur Lassi Borðoy frá Sjóvinnudeplinum.

Og hóskvøldið hittust manning frá Naddoddi og manning frá Sjóvinnudeplinum í Naddoddaneystinum á Tvøroyri, har Lassi Borðoy handaði Helga Enni frá Bátafelagnum Naddoddi ein gávukekk á 10.000 krónur.

Um ynski framyvir er um at hava trygdarskeið á Tvøroyri, so er ongin forðing fyri hesum, eru báðir partar samdir um.



*Hóskvøldið hittust manning frá Naddoddi og manning frá Sjóvinnudeplinum í Naddoddaneystinum á Tvøroyri, har Lassi Borðoy handaði Helga Enni frá Bátafelagnum Naddoddi ein gávukekk á 10.000 krónur*

*Mynd; D. Olsen*